# Jólagávur frá Jógvani Weihe







Ein av litríku handlunum í høvuðsstaðnum er P/f Jógvan Weihe í Stiðjagøtu í Havn, sum selur alt frá smáum pilkum til stórar bátar.

Handilin varð stovnaður av Jógvani Weihe, sum sjálvur arbeiddi sum ferðandi sølumaður, áðrenn hann stovnaði sína egnu fyritøku í 1991. Síðan 2004 hevur fyritøkan hildið til í stóra virkisbygninginum við Stiðjagøtu í Havn.

Handilsbygningurin rúmar einum hópi av ymiskum vørum og hevur umboð upp á alt millum himmal og jørð - alt frá hosum til plattar av hoyggi og stórar Viksund bátar.

Í handlinum er eisini ein rúgva av bæði arbeiðs- og frítíðarklæðum at finna av kendum merkjum sum Bergans, Helly Hansen og Fjällräven. Eisini umboðar fyritøkan svensku arbeiðsklæðini Tranemo.

Fyritøkan er kend fyri sítt stóra úrval av arbeiðsklæðum og fiskireiðskapi, bæði til vinnuna og til frítíðarfiskaran, kampingútgerð, eins og setepli og útgerð til urtagarðsrøkt. Fyri at taka burtur úr rúgvuni kunnu vit nevna at fyritøkan eisini selur t.d. ruskíløt, fløgg, skógvar og stivlar, vakummaskinur, grillir og terassuhitarar.

Í sambandi við jólini hevur P/F Jógvan Weihe eina rúgvu av góðum tilboðum og jólagávuhugskotum.

# Hetta er mín jólasangur



FRØI

*– Vit skulu frøast, tí ein frelsari er føddur. Og tað er júst hetta sum jólini hava at siga fyri meg, sigur Kristina Eyðbjørnsdóttir, ið er ættað úr Leirvík*

## Kristina Eyðbjørnsdóttir:
*Føgur er foldin*

- Jólini eru fyri mær, og nokk fyri tey flestu, ein heilt serlig tíð. Eg elski jólini, og eg blívi í so "ekstra" góðum lag, tí eg haldi at hetta er ein so friðsæl tíð, sigur Kristina, ið er ættað úr Leirvík.

Eg elski tann "stemning" sum eg komi í, og allan henda hugnan. Men tað er eisini nakað heilt serligt sum hendi á jólum, fyri meg og fyri øll menniskju.

Tað at Jesus bleiv føddur í eini krubbu í einum fjósi, haldi eg eisini hevur nakað serliga friðsælt yvir sær. Hann er Konganna Kongur, men hann gjørdi einki serligt hóvasták burturúr. Men eingin er sum hann, og fyri mær í dag er hann mín frelsari og mín klettur.

Eg havi ofta ímyndað mær hesa náttina, tá hann bleiv føddur; hvussu veðrið var; hvussu stemningurin var millum tey fáu sum vóru har, tá ið hann bleiv føddur. Eisini tað hevur nakað heilt friðsælt yvir sær, tí eg ímyndi mær at veðrið var av tí allar besta. Eingin vindur, stjørnurnar og mánin lýstu yvir alla markina, og gjørdi tað uppá tann mátan ljóst men eisini hugnaligt. Eisini her var alt so friðsælt.

Tað er Føgur er Foldin sum eg altíð hugsi um, tá ið jólini nærkast. Síðsta versið í hesum sangi er so deiligt, haldi eg. Hetta, at tað kom ein friður á jørð, og vit skulu frøast, tí tað er ein frelsari sum er føddur. Og tað er júst hetta sum jólini hava at siga fyri mær.

- Mín Frelsari bleiv føddur tá. Og hvat kann vera meiri friðsælt enn tað?, sigur Kristina Eyðbjørnsdóttir.

## Føgur er foldin

*Føgur er foldin,
dýrdarríkur himin,
sæl er sálanna jorðsalferð.
Um allan heimin,
um allar ævir
tað syngjandi at himni ber.*

*Øldirnar fara,
øldir munnu koma,
ætt eftir ætt søkkir undir mold.
Ongantíð tagnar
ljóðið av himni,
sum gleðir sálir her á fold.*

*Einglar tað kvóðu
jólanátt for hirðum,
mann eftir mann hoyrdist sama lag:
Friður á foldum,
menniskja frø teg,
tær føddur frelsari er í dag.*

(Ingemann 1850/J. Dahl 1912)